## Blákrossheimið søkir eftir

# Sjúkrarøktar-frøðingi

Talan er um eitt avloysarastarv, 0,8 tíð, í skiftandi vaktum at byrja 01.10.2003 og fram til 30.09.2004

**Starvið umfatar**
Sjúkrarøktarligu uppgávurnar í sambandi við avrúsan og viðgerð á heiminum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt at starvinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn- og setanatreytir annars verða sambært sáttmála millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá Olgu Magnussen, leiðara, á tlf. 315575.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12
100 Tórshavn
Tlf. 315575 · fax. 315567

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri.

Pláss eru fyri 15 búfólkum. Eisini er búfelagsskapur og eftirviðgerð knýtt at heiminum.

Blái Krossur Føroya er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsevnismissnýtslu, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, og at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

# Ætlar tú at ættleiða eitt barn?

Kom so á kunningarfund hjá tí danska ættleiðingarstovninum AC International Børnehjælp, sum fyrr kallaðist Adoption Center

**leygardagin 27. september kl. 13.00
á Hotel Hafnia**

Fundurin tekur umleið 3-4 tímar.

Á fundinum fær tú at vita um
- Adoptiónsprocessina frá A-Z
- Kunning um tey lond, børnini koma frá
- Kunning um børnini
- Frágreiðing um AC International Børnhjælp

Á fundinum luttaka leiðarin Jørgen-Ulrich Raunskov og nevndarlimurin Asger Thomsen. Tú fært høvi til at seta spurningar, sum ofa stinga seg upp í samband við ættleiðing.

Fundurin er ókeypis, men tað er neyðugt at boða frá luttøku. Við fráboðan fært tú meira at vita frá Kirstin Andersen á tlf. 0045 86204843 ella á t-post: ka@a-c.dk

Tú kanst lesa meira um ættleiðing á www.a-c.dk

# Diabetesaften

Diabetesforeningen Føroya holder i samarbejde med

**MediSense, Danmark**
Konsulent Alice Kiilerich og Kirsten Søgaard

**Diabetesaften
I
MBF-huset
Islandsvegur 10-C
FO 100 Tórshavn**

**Onsdag den 17. september 2003
kl. 19:30-ca. 22:00**

Kom og hør:
**"Lev godt med din diabetes"
" Mål blodsukker"**
på
**Precision Xtra™**

Et lille, enkelt og pålideligt apparat, hvor du kan måle både

**blodsukker & blodketoner**

Se også **Soft•Sense™** en ny blodsukkermåler, hvor du skåner fingrene og som måler blodsukker helt smertefrit.

# Pedagogur

Fyri pedagog í farloyvi verður søkt eftir pedagogi til ein stovn við 30 børnum í aldrinum 3-7 ár. Starvið er 25 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Starvið verður at seta 15. oktober 2003 til 31. august 2004.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 10-15.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi týsdagin 23. september 2003.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett í starv 30 tímar um vikuna.

**Barnagarðurin Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 31 75 35

**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
**ADC**-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820

# Til sølu



**BMW 100/7 motorsúkla**
1000cc
Væl viðfarin frá fyrsta degi og í sera góðum standi

Sera lagalig fígging.

**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

## Skeið í Navision C5 á Hotel Hafnia

Aftur í ár skipa vit fyri skeiði í bókhaldsforritinum Microsoft Navision C5

Hesa ferð eru 2. Skeið:

- Grundskeiðið sum snýr seg um Applikation I, og
- Víðkaða skeiðið sum snýr seg um Finans II við serligum atliti til goymslu modulið

Skeiðini vara í 2 dagar hvørt.
Grundskeiðið er dagarnar 30/09 og 01/10
og víkaða skeiðið er dagarnar 02/10 og 03/10

Síðsta freist at tekna seg er 18/09

Ring til okkum og fá nærri upplýsingar.

Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Postsmoga 1144
FO-110 Tórshavn
Tlf: 317620 - Fax: 317699 - info@tt.fo
Microsoft CERTIFIED

## Eplir úr Miðstovuni á Sandi

Leygarmorgunin 13. september kl. 10.00 og so leingi nakað er eftir, selja vit eplir uppi við Mjólkavirkið í Hoyvík.

Eplini eru hvít (Folva) og reyð (Oleva)

**20 kg sekkir á 150 kr.**

Miðstovugarðurin á Sandi
tel 361057

Sosialurin 341800



**Vegna Føroya Skiftirætt verða hesar ognir lýstar til sølu**



# Sethúsognin Álvastíggjur 11, Tórshavn

**Grundøki:** 517 m². Kjallari og miðhædd uml. 100 m² hvør og loftshæddin uml. 75 m².
**Kjallarahædd:** vindfang, gongd, fýrrúm, eitt stórt og eitt minni rúm, ið hava verið nýtt til skrivstovu, køkur.
**Miðhædd:** trappu-uppgongd úr kjallara uppá loft, gangur, køkur, spískamar, stova, toilett, kamar, lítil hjallur.
**Loft:** 2 sovikømur, stór loftsstova, baðiverilsi.
**Byggiár:** 1969.

Húsini standa í friðarligum umhvørvi.

Garður er gjørdur um stykkið.

# Hús og trøð í Nesvík

Ognin er matr. nr. 4, Streymnes.

Húsini eru 36 m² við kjallara-, stovu- og loftshædd við tilbygningini uml. 12 m²

Trøðin er uml. 5.000 m²

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

# Trøð í Norðragøtu

Um hóskandi boð fæst, verður ein ódyrkað trøð í Norðagøtu seld. Trøðin er 11.800 m².

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, frp@advlaw.fo

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen , adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45

# ALMANNASTOVAN

## Samskipari

Søkt verður eftir samskipara til Dagtilhaldið Rók, sum er royndarskipan fyri fjølbrekað børn úr Nes og Runavíkar Kommunu. Starvið er tíðaravmarkað til 31.12.2003 og samskiparin hevur tilvísing til leiðarin á brektoyminum.

**Uppgávur:**
- Uppgávurnar eru at samskipa arbeiði viðvíkjandi viðgerð, umlætting, eins og stimbran og menna av stuðulsarbeiðinum við fjølbrekaðum børnum.
- Eisini skal samskiparin saman við upptøkunevndini gera av, hvørji børn kunnu verða upptikin til tilhaldið.

**Ábyrgdarøki:**
- Samskiparin hevur ábyrgd av leiðslu, ráðlegging og samskipan av tilhaldinum.
- Ábyrgd av at menna tilhaldið soleiðis at tað er tillagað tørvinum hjá brúkarunum.

**Førleikakrøv:**
Vit ímynda okkum ein persón, sum hevur
- Viðkomandi fakliga útbúgving
- Umsitingarligar og fakligar royndir
- Evni at seta í verk fyriskipanir
- Góð samstarvsevnir
- Góð evnir at orða seg bæði munnliga og skrivliga

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Elspu Olsen, leiðara av brektoyminum, tlf. 353510 millum kl. 09.00 og 13.00.

## Málsviðgeri

Á Almannastovuni er eitt starv sum avloysari fyri málsviðgera í farloyvi á Arbeiðsmarknaðardeildini leyst at seta sum skjótast og inntil 01.09.2004.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki:**
- Ráðgeva og vegleiða í samband við arbeiðsmarknaðin
- Gera virkisætlanir til tess at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin
- Gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensiónum
- Geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- Uppfylgja dagpeningamálum.

**Arbeiðsuppgávur:**
- At fremja fyrisitingarliga partin av málsviðgerðini
- Taka ímóti áheitanum, sum koma til deildina.

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH, ella onnur fyrisitingarlig útbúgving
- Royndir innan almenna fyrisiting
- Kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- Góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- Kunnleiki til medisinska terminologi er ein fyrimunur

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara á tlf. 353510

**Fyri bæði størvini er galdandi:**

**Vit bjóða:**
- Starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum.
- Møguleika fyri persónligari og fakligari menning

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. verður at senda til

**Almannastovuna**
Att.: Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 22.09.2003

***Um Almannastovuna***
*Fyri at betra um tænastustøði hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni ein og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjaligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almnnastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landdekkani serdeildir.*

# Ullamóttøka í Vági

Seinasti dagurin vit taka ímóti ull í ár verður fríggjadagin 26. september.

**Sirri í Vági**

# Flag til sølu

900 fermetrar av góðum flagi til sølu.

**Grækaris Joensen
Tlf. 212265**